# Tjóðveldi mælir til progressivan kommunuskatt

**Meðan Tjóðveldi tekur undir við at fækka kommunurnar og leggja øki út, mælir flokkurin eisini til at skattaskipanin skal gerast samhaldsføst og progressiv**

KOMMUNUREFORMUR
*Rógvi Nybo*
*rogvu@sosialurin.fo*

Í politiskari viðmerking til miðlarnar boðar Tjóðveldi frá, at flokkurin tekur undir við at fækka kommunurnar og at eldraøkið og fólkaskúlin skulu leggjast út til kommunurnar at umsita. Tó vil flokkurin, at eldraøkið verður tað fyrsta økið, tá kommunurnar longu hava ávísar innihaldsligar og fyrisitingarligar royndir á økinum.

Tjóðveldi vísur tó á, at veikasti parturin í nýggja kommunala álitinum, er tann fíggjarligi parturin.

Trupulleikin er sambært Tjóðveldi, at verður skattaskipanin ikki broytt, so kommunuskatturin eisini kann krevjast inn stigvaksandi, og stór samfelagsøki kortini verða løgd út til kommunurnar, so verður samhaldsfasta fíggingin av vælferðarsamfelagnum undirgrivin og tey, ið hava minst koma at gjalda uppaftur meira.

Harafturat vísur Tjóðveldi á, at verður blokkstuðul latin frá landi til kommunur, so er øll greið ábyrgd farin beinanvegin og eisini frælsið hjá kommununum

Tí mælir Tjóðveldi staðiliga til, at skattaskipanin verður broytt, soleiðis, at kommunuskattur eisini verður ásettur progressivt, og at hetta verður fíggingargrundarlagið til nýggju økini hjá kommununum.



# Vaktarskifti í Samuelskirkjuni

**Derhard Olsen, ið hevur røkt starvið sum sóknarprestur á Nørrebrúgv og prestur fyri føroyingar í Keypmannahavn síðani 1. september í fjør, leggur frá sær tann 31. oktober, og Bergur Jacobsen sum hevur verið í farloyvið tekur við aftur**

TÍÐINDASKRIV
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



Føroyski presturin í Keypmannahavn, sum hann verður nevndur, røkir bæði starvið sum danskur sóknarprestur á Nørrebrúgv og prestur fyri føroyingar í Keypmannahavnarøkinum, herundir eisini Ríkissjúkrahúsið og Sjúklingahotellið Tórshavn, og tað er hesi størvini Derhard hevur røkt seinastu 14 mánaðirnir.

Nú Bergur Jacobsen tekur við aftur er mannagongdin hin sama, við føroyskum guðstænastum í Samuelskirkjuni hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum klokkan 14, og guðstænastum á Sjúklingahotellinum annan hvønn hósdag klokkan 20.30.

## Metroin ger Samuelskirkjuna til miðdepil

Stundum hevur verið funnist at, at Samuelskirkjan er ov fjarskotin fyri føroyingar flest í Keypmannahavn, men við nýggju metrostøðunum á Nørrebros Runddel og Nørrebro Station, verður Samuelskirkjan knappliga ein miðdepil í ferðslukervinum í Keypmannahavn.

## Farvæl og takk Derhard

Føroyska kirkjuráðið í Keypmannahavn fegnast um at tað beinanvegin í fjør eydnaðist at fáa ein avloysara til starvið sum føroyskur prestur í Keypmannhavn, og at Derhard til fulnar hevur røkt hettar starvið seinastu 14 mánaðirnir.

Hann prædikar fyri seinastu ferð í hesum umfarið, sunnudagin 18. oktobur, sum er 19. sunnudagur eftir trinitatis. Hugurin hjá Derhard stendur helst til embætið í Føroyum, og kirkjuráðið ynskir honum góða eydnu á leiðini.